## Semja í Darfur

Ein sáttmáli millum sudansku stjórnina og ta størstu uppreistrarrørsluna í Darfur gevur vónir um frið í økinum. Í sáttmálanum, sum partarnir skriva undir í dag, binda teir seg til at lata hvør øðrum fangar og at steðga øllum ágangi ímóti teimum 2,2 milliónum flóttafólkunum, sum eru rikin frá húsi og heimi undir ófriðinum. Politiskir eygleiðarar siga, at tann nýggi sáttmálin gevur vónir um, at tað skal eydnast at fáa enda á stríðnum í Darfur, sum hevur kostað meiri enn 300.000 mannalív tey seinastu seks árini. Qatar hevur virkað sum semingsmaður í ósemjuni, og sáttmálin verður undirskrivaður har í dag.



## Kavbátar stoyttu saman

Tíðindini um, at tveir kjarnorkuriknir kavbátar úr Bretlandi og Fraklandi stoyttu saman í Atlantshavinum í síðsta mánað, hava vakt stóran ans. Serfrøðingar siga, at vandin fyri einari kjarnorkuspreinging hevur verið sera lítil, men at ein leki umborð á øðrum ella báðum kavbátunum kundi fingið sera álvarssamar avleiðingar fyri havumhvørvið. Bretsku og fronsku myndugleikarnir vilja einki siga um óhappið, men serfrøðingar gita, at teir báðir kavbátarnir hava verið við í einari venjing, tá teir komu ov nær hvør øðrum.

# Hjartabørn hittast til gaman og álvara í Havn

**Leygardagin verður tiltak í Havn, har hjartasjúk børn og teirra avvarðandi hittast til gaman og álvara. Vaksin, sum eru fødd við hjartafeili, eru eisini vælkomin við**

HJARTABØRN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Leygardagin verður fyrsta tiltakið fyri hjartabørn í Føroyum. Her eru tað Conny Poulsen úr Hvalba, sum er nevndarlimur í felagnum, Hjartabarnið, og maður hennara, Sveinur, við teirra lítla hjartabarni, sjey ára gamla Páll Hermanni, ímillum sín*

Leygardagin er ætlanin at savna øll hjartasjúk børn í Føroyum til eitt tiltak í Havn, sum verður bæði til gamans og álvara.

Samstundis eru vaksin, sum eru fødd við hjartafeili, eisini vælkomin við.

Foreldur at børnum við hjartasjúku hava nýliga stovnað felagið, Hjartabarnið, sum er eitt undirfelag hjá Hjartafelagnum

- Endamálið við felagnum er at stuðla foreldrum, sum hava fingið eitt barn við hjartasjúku, sigur Conny Poulsen í Hvalba, sum er ein av nevndarlimunum.

Hon sigur, at foreldur, sum fáa børn við hjartasjúku, kunnu viðhvørt kenna seg nokk so einsamøll og hjálparleys og tí er ætlanin at stovna felagið fyri at kunna vera um hvønn annan og stuðla hvørjum øðrum.

- Endamálið er eisini at varpa ljós á hendan serliga trupulleikan við hjartasjúkum børnum og at hittast av og at njóta gott av royndunum hjá hvørjum øðrum.

Tey ætla eisini at gera ein faldara um hjartasjúk børn

Fyrsta tiltakið hjá felagnum verður í leygardagin 21. februar í nýggja partinum av Kommunuskúlanum í Kongagøtu.

Tey byrja klokkan 10 við morgunmati og hugna.

Síðani fer danski serlæknin í viðføddum hjartasjúkum, Lars Søndergaard, at halda áhugaverdan fyrilestur.

Ímeðan fyrilesturin er, hava tey ymiskt undirhald til børnini, eitt nú fáa tey vitjan av Hannibal.

Í døgverðasteðginum fáa tey okkurt til matna og aftan á er kjakfundur um viðurskiftini hjá húskjum við hjartasjúkum børnum.

Ímeðan fundurin er, hava børnini møguleika at hugna sær við ymiskum undirhaldi og aftan á fara øll at sláa tunnu.

Conny Poulsen sigur, at tey vita ikki, hvussu nógv hjartasjúk børn eru í Føroyum, men tey vilja fegin savna so nógv sum gjørligt í felagnum og tí vóna tey eisini at síggja so mong sum gjørligt av teimum á tiltakinum leygardagin.

# Suðuroyingar seta skjøtil á skúlabygging fyri 90 milliónir

**Kommunurnar í Suðuroy eru sinnaðar at taka Helenu Dam á Neystabø upp á orðið um at fara undir at projektera eftirskúla í Hvalba í ár**

Líkt er til, at allar kommunurnar í Suðuroy eru sinnaðar at játta pening til at projektera nógv umrødda eftirskúlan í Hvalba.

Á figgjarlógini fyri í ár, samtykti Løgtingið at seta tvær milliónir av til at projektera skúlan fyri.

Men treytin er, at kommunurnar eisini seta tvær milliónir av.

Og kommunurnar ætla at taka Løgtingið og Helenu Dam á Neystabø upp á orðið og at seta kravdu upphæddina av.

Umboð fyri allar kommunurnar hava tosað saman um málið og tær eru samdar um, at fyri at avgreiða málið skjótt, er tað ikki ráðiligt at fara til allar kommunurnar í Føroyum við áheitan um at játta hvør sín part.

Tí hava kommunurnar í Suðuroy gjørt av at tær skulu játta peningin og hesa næstu tíðina skulu tey sjey bý- og bygdaráðini so formliga samtykkja at seta hvør sína upphædd av til endamálið, alt eftir fólkatalinum í kommununi.

Higartil hava kommunustýrini í Porkeri, í Hovi og á Tvøroyri viðgjørt málið og hava samtykt at játta sín part.

Hinar fýra kommunurnar taka so málið upp so hvørt, tær hava fund.

Tvøroyrar Kommuna, sum betalir størsta partin, samtykti málið í farnu.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at tá ið allar kommunurnar, sum væntað, hava samtykt málið, er ætlanin at biðja um fund við landsstýriskvinnuna í mentamálum og við politikarar annars.

Har er ætlanin at kunna allar partar um, at kommunurnar partur av pengunum er klárur. Og har er eisini ætlanin at stinga út í kortið, hvussu farast skal fram, so at projekteringin kann byrja sum skjótast.

Hann sigur, at endamálið er so at fáa gongd á projekteringina sum skjótast, so at tað verður klárt at byggja næsta ár.

Eftirskúlin er mettur at kosta 90 milliónir og har verður pláss fyri einum 90 næmingum.



*Ætlanin er at byggja eftirskúlan á slættlendinum millum Roynhøllina og fótbóltsvøllin, mitt í Hvalba. Hugskotið er, at talan er um eina langa lon, sum er trýst saman fyri at varðveita so stóra framsíðu sum gjørligt*